## Grannar ósamdir



Russland leggur grannalandið Ukraina undir at royna at beina fyri tí tætta búskaparliga samstarvinum landanna millum. Tað stendur í einum brævi, sum russiski forsetin hevur sent starvsfelaga sínum í Kiev. Hann skrivar, at tað er serliga á orkuøkinum, at Ukraina er farið at ganga egnar leiðir, og at tað vantandi samstarvið er ein vandi fyri gassflutningin úr Russlandi til hin partin av Evropa. Russiska gassið fer ígjøgnum leiðingar ígjøgnum Ukraina. Ukraina keypir eisini russiskt gass, men sum hevur ilt við at gjalda tað, og tað hevur fleiri ferðir fingið russar at skrúva fyri.

## Hjálparfólk myrd

Russisku myndugleikarnir váttaðu í morgun, at teir høvdu funnið líkini av tveimum hjálparfólkum, sum vórðu burturflutt í Kekenia í gjár. Sarema Sadulajeva og maður hennara, Alik Dsjabrailov, vóru á skrivstovuni hjá einum teirra hjálparfelagsskapi, tá ókendir menn komu inn á skrivstvuna og tóku tey við sær. Í morgun vórðu tey funnin myrd í viðførisrúminum á einum bili, sum stóð í útjaðaranum á kekenska høvuðsstaðnum Grosnij. Aðrir hjálparfelagsskapir siga morðini vera púra meiningsleys, tí tey myrdu hjúnini løgdu seg eftir at hjálpa neyðstøddum børnum.

# Fann umsíðir mammu

**64 ára gamli Johan Thomsen úr Hvalba hitti í fjør á fyrsta sinni mammu sína Katrinu, sum nú býr í USA. – Vit tóku um hálsin á hvør øðrum, og tárini bara runnu, sigur krígsbarnið Johan Thomsen**




*Johan og Katrina vóru alla tíðina saman, meðan hann var og vitjaði*

LAGNUSØGA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Vit kenna øll donsku sjónvarpssendingina Sporløs, sum hjálptir fólki til at finna næstafólk ella uppruna sín.

Johan Thomsen, sum er ættaður úr Hvalba, royndi at fáa Sporløs at hjálpa sær við at finna mammuna, men har var eingin hjálp at heint. Men tað eydnaðist Johan at finna mammuna.

Johan Thomsen úr Hvalba betur kendur sum Johan hjá Olinu, vaks upp hjá góðum fólkum í Hvalba, Dánjali og Olinu Thomsen. Hann hevði tað gott hjá teimum og visti ikki betur enn, at hesi bæði fólkini, sum ikki áttu onnur børn, vóru foreldur hansara.

- Eina ferð, eg var tólv ára gamal, var eg inni hjá einum vinmanni, sum búði hjá ommu síni. Tá spurdi tann gamla konan meg, um eg frætti nakað frá mammu míni í Amerika, sigur Johan.

Hetta goymdi hann inni í sær og segði einki heima í langa tíð.

Ein dag kom fosturmamman og segði við hann, at hann átti eina aðra mammu.

- Eg segði bara, at tað visti eg.

Fosturmamman segði honum eisini, at mamman tá búði í Íslandi, og Johan minnist, at hann fór at gráta, tá ið hann hetta fekk at vita.

### Krígsbarn

Johan fekk at vita, at mamman, sum æt Katrina, var dóttir Edvard og Jolinu Berg, født Ellefsen. Av tí at Katrina hevði familju í Miðvági, fór hon vestur hagar at arbeiða og var har undir krígnum.

Har kom hon saman við einum enskum hermanni, sum arbeiddi á flogvøllinum, og hon gjørdist við barn. Hermaðurin segði við mammu Johan, at hann kundi einki hava við hana at gera, tí hann var giftur og átti børn.

### Mamman vildi burtur

- Mamma fór so aftur til Hvalbiar og føddi meg. Men hon vildi sleppa burtur, til Íslands og gav meg tí til skyldfólk. Tí er tað, at eg havi Thomsen og ikki Berg sum eftirnavn. Presturin kann hava gjørt eitt mistak, ella hann væntaði, at tey fóru at ættleiða hann. Ein triði møguleiki kann hava verið, at forsturforeldrini vildu verja dreingin og góvu honum tí teirra eftirnavn.

Mamma Johan fór til Íslands, búði har í fleiri ár, giftst einum amerikumanni og fekk tvey børn við honum.

### Minnist ikki vitjanina

Johan hevur fingið at vita, at mamman eina ferð var heima aftur og vitjaði, meðan hann var smádrongur. Men hann minnist tað ikki og hevur tí tá neyvan fingið at vita, hvør hon var.

Í 60-árunum flutti mamman við familju til Amerika.

Tá ið Johan var vaksin, fór hann til Grønlands, har hann fann sær gentu. Tey fóru til Føroya og giftust. Í 70-árunum fluttu tey aftur til Grønlands, men í 1982 doyði konan, og hann kom aftur til Føroya sum einkjumaður við trimum smábørnum.

– Tað var eitt rimmar tak, sum fosturmamman gjørdi, tá ið hon tók øll trý børn okkara til sín, sigur Johan.

Í 1993 giftist hann uppaftur, hesa ferð við eini polskari kvinnu.

### Droymdi um mammuna

Hann hevði í nógv ár ein dreym um at koma í samband við mammu sína. Onkrar gamlar adressur hevði hann, men svar kom einki. Eisini vendi hann sær til Reyða Kross í Føroyum, men tað hjálpti líka lítið.

Fyri 13 árum síðan fluttu Johan og konan til Danmarkar at búgva, og har royndi hann at sleppa við í sjónvarpssendingina Sporløs, sum hjálpir fólki við at finna ættarfólk, men tað bar ikki til. Tá hevði hann ætlað at leitað bæði eftir mammuni og pápanum, tí hann hevði navnið á pápanum. Meðan Johan fyrireikaði seg til Sporløs, kom hann eftir, at hann hevði tvær ymiskar dápsváttarnir. Á aðrari stóðu fosturforeldur hansara at vera hansara foreldur, og tí fekk hann eftirnavnið Thomsen. Á hinar stóð navnið á veruligu mammuni og enska hermanninum sum pápi.

### Familja hjálpti

Johan gavst ikki so. Hann setti seg í samband við eitt systkinabarn, hvørs mamma var mostur Johan. Hesin bað hann gloyma alt um Sporløs, tí hann visti onnur ráð. Mamma hansara hevði nevniliga havt brævsamband við familjuna í Íslandi, og familjan hevði eisini havt samband við tey, eftir at tey vóru flutt til Amerika.

Hann fekk adressuna og fekk hjálp til at skriva til hennara á enskum. Men framvegis kom einki svar.

### Oh, my God

– So tíðliga ein morgun tók eg dik á meg og ringdi.

Ein kona svaraði í hinum endanum.

– Yes, tað var Katrina.

Tá ið hann so fekk forklárað, hvør hann var, svaraði hon bara:

– Oh, my God!